e-mail: jakup@sosialurin.fo

**Ítróttur**

Sosialurin - Box 76 - 110 Tórshavn - Tlf. 31 18 20 - Fax 31 47 20

**Lesið alt um ítróttin um vikuskiftið í ÍtróttarSosialinum týsdagin www.sosialurin.fo**

# Ætla sær í Tivoli

*Todi Jónsson og liðfelagar hansara gerast ein alsamt minni partur av virkseminum hjá FCK, sum nú ætlar at víðka enn meira um virksemið*



Sterki maðruin í FCK, Flemming Østergaard, skelkaði øll, tá hann gjørdi av at keypa Parken. Nú sigst at hann hevur ætlanir um at keypa Tivoli

JÁKUP MØRK

Danska dagblaðið, BT, visti fyrradagin at siga, at felagið hjá Toda Jónsson, FCK, nú hevur ætlanir um at keypa seg inn í Tivoli.

FCK, ella Parken Sport & Entertainment sum felagið veruliga eitur, hevur í fyrsta umfari ætlanir um at keypa 43% av partapeninginum frá Carsberg, sum hevur fráboðað, at teir ætla sær at selja sín part í hesum árinum.

Harumframt er ætlanin, at felagið eisini skal keypa tey átta prosentini av partapeninginum, sum Den Danske Bank eigur, soleiðis at talan í alt verður um 51% og harvið samlaða avgerarrættin í Tivoli.

**Ikki bara fótbóltur**

Frammanundan hevur FCK keypt danska tjóðarvøllin, Parken, og sum navnið sipar til, so er tað eisini annað enn fótbóltur, sum er á skránni í felagnum.

Stjóri felagsins, Flemming Østergaard, sigur eisini, fótbóltsdeildin ikki er týdningarmesta inntøkukelda felagsins. Eydnast tað veruliga at keypa Tivoli, gerst fótbólturin ein alsamt minni partur av felagnum, men hinvegin kann hetta eisini vera við til at tryggja, at raksturin sjálvur gevur yvirskot, og at tað tískil ikki er neyðugt at selja bestu leikararnar, fyri at hava felagið koyrandi.

Hóast Tivoli ikki hevur havt serliga góð roknskapartøl at víst á seinastu árini, so er talan framhaldandi um munandi peningaupphæddir, sum skulu leggjast á borðið, um keypið skal gerast veruleiki. Serfrøðignar á økinum rokna við, at talan verður um einar 400 mió.kr., umframt at tað eisini er vanligt við einum eykagjaldi, tá keypari fær fullan avgerarætt í einum felag.

**Í kapping við Disneyland**

BT leggur tó dent á, at enn er einki avgjørt hesum viðvíkjandi, og sjálvur hevur Flemming Østergaard sagt, at hann avjgjørt ikki hevur nakrar viðmerkingar til málið.

Framman undan hevur ljóðað, at bæði útlendskir og danskir keyparar hava víst áhuga, men danir vilja sjálvsagt helst, at Tivoli skal verða verandi á donskum hondum.

Millum útlendsku keypararnar, sum hava víst áhuga, eru bæði Disneyland og Michael Jackson, so tað kundi væl hent seg, at keypspeningurin verður væl hægri enn omanfyri nevnt.

Um keypið kann viðføra, at leikararnir sleppa ókeypis inn í Tivoli, sigur søgan tó einki um.

# Ov linur dómur

*Stóð tað til dómaran, hevði fyrrverandi ítróttarlæknin fingið nógv harðari revsing, men lóggáva og siðvenja forðaðu hesum*

JÁKUP MØRK

Mikudagin var fyrrverandi eysturtýski læknin, Lothar Kipke, dømdur 15 mánaða treytaða fongsulsrevsing umfram eina bót áljóðandi 29.000 kr.

Orsøkin til dómin var, at hann í fleiri ár hevði lagt til rættis og framt skipaða doping móti eysturtýskum svimjigentum.

Á ákærubeinkinum sótu m.a. fimm konur, sum í sínari tíð vóru undir efturltiið av Kipke, og merkja tær nú avleiðingarnar av hesum. Árinini, sum tær tríggjar høvdu fingið vóru ymisk, m.a. hevði onkur teirra fingið vanskeplað børn, onkur hevði ov nógv hár á kroppinum, ov djúpa rødd o.s.fr. Alt tekin, sum vanliga boða frá misnýtslu av anabolskum steroidum.

Hóast verjin hjá Kipke royndi at føra fram, at Kipke nú í fleiri ár hevði verið við í tí eftirlitsarbeiði, sum nú verður gjørt, til tess at steðga dopingini, so læt dómarin ikki við seg koma.

Einasta viðmerkingin hjá dómaranum var, at hann harmaðist um, at hann orsakað av lóggávu og rættarligari siðvenju, ikki kundi fella ein harðari dóm.



Gunnar Mohr, formaður í HB

*Savnsmynd*

# Pætur gjørt sáttmála

*Fyri stuttum gjørdi HB sáttmála við Pætur Dahl, sum er ein av teimum leikarum, sum felagið ætlar at satsa upp í framtíðini*

JÁKUP MØRK

Hóast flestu feløgini fyri langari tíð síðani eru farin at fyrireika seg til komandi kappingarár, so eru enn ymsir lutir, sum enn ikki eru komin í fasta legu.

Eitt sum nógv verður tosað um, er hvar ymsu leikararnir munnu fara at leika komandi ár, tí seinnu árini er tað vorðið alsamt meira vanligt, at leikarar skifta millum feløg, soleiðis at feløgini, sum kunnu bjóða leikarunum bestu fortreytirnar, eisini er feløgini við sterkastu leikarahópinum.

Fíggjarliga er tað tó ivaleyst eisini ein ov stórur biti, um feløgini alla tíðina skulu styrkja seg við leikarum uttan ífrá, í vónini um at vinna meistaraheitið, og hetta hava teir eisini ásanna í HB.

Fyri at tryggja sær, at felagið í størri mun kann framleiða sínar egnu fyrstudeildarleikarar, gjørdi leiðslan í felagnum seinasta ár av, at skriva sáttmálar við nakrar av yngru leikarum felagsins.

**Sáttmála við unglingaleikara**

Fyri stuttum var so enn ein sáttmáli av hesum slag skrivaður, tá felagið tryggjaði sær, at unglingaleikarin, Pætur Dahl, verður verandi í felagnum.

Gunnar Mohr, formaður í HB, sigur við Sosialin, at talan er um ein sonevndan byrjunarsáttmála, og merkir hetta eisini, at hetta als ikki er nakað, sum leikarin gerst ríkur av. Sáttmálin er tó soleiðis háttaður, at ein sonevnd glíðiskala er innbygd, og merki hetta, at um leikarin megnar at bíta seg fastan á besta liði felagsins, verður samsýningin betra samsvarandi avrikinum.

Hóast hann enn ikki bitið seg fasta á besta liðnum hjá HB, so er eyðsæð, at Pætur hevur góð fótbóltsevni. Umframt at hann alt seinasta ár var fastur fúsur á unglingaliðnum, sum leikti seg í hálvfinaluna, so gjørdi hann eisini rættuliga um seg í aðru deild, umframt at hann onkran dystin var at síggja millum skiftisleikararnar á besta liðnum.

**Farnir í gongd**

Leikararnir hjá HB eru annars farnir undir venjingina. Venjari felagsins, Ion Geolgau, kemur tó ikki til Føroya fyrr enn 25. januar, men til ta tíð er tað fyrrverandi miðvallarin á fyrstu deild, Ingi Rasmussen, sum stendur á odda fyri venjingini.



# Hondbólturin um vikuskiftið

*Størsti spenninguin hetta vikuskiftið man snúgva seg um, hvussu hálvfinalurnar hjá kvinnunum fara at laga seg*

JÁKUP MØRK

Hetta tí bert ein dystur verður leiktur í landskappingini hjá kvinnunum. Hjá monnunum verður botnuppgerð í Havn, men eisini verður spennandi at síggja, um Kyndilsliðið endiliga hevur funnið stevið.

**Tvær ferðir VB**

Bert ein dystur verður leiktur í landskappingini hjá bestu kvinnuliðunum hetta vikuskifti. Upprunaliga var ætlanin, at tríggir dystir skuldu verða leiktir, men orsakað av at kvinnudeildin nú bert telur seks lið, umframt at hálvfinalurnar í steypakappingini skulu leikast, verður talan bert um dystin suðuri í Vági millum VB og Tjaldur.

Lítið er at ivast í, at VB kvinnurnar eru greiðir favorittar undan hesum dysti, hóast tær nú munnu hava mist vónirnar um at vinna sær heiðursmerki hetta kappingarárið.

Áðrenn tær á heimavølli skulu møta botnproppinum, skulu suðuroyðargenturnar eitt legg til havnar, við tað at tær eru annar parturin, tá Neistin á heimavølli skal spæla fyrru hálvfinaluna. Neistaliðið hevur spælt væl seinastu dystirnar, og hóast VB liðið eisini hevur sýnt stak góðan hondbólt til tíðir, so loyvi eg mær at meta neistaliðið sum favorittar til dystin. Tó ikki meira enn so, at tað als ikki er talan um nakra sensatión, um tað skuldi verið soleiðis, at sigurin fór suður um fjørðin.

Í hinari hálvfinaluni tekur Kyndil móti Stjørnuni. Hesin dysturin verður leiktur sunnudagin, og ivaleyst verður tað soleiðis, at kyndilsgenturnar skulu á vøllin, uttan at hava nakran venjara aftan fyri seg. Spurningurin er tó, hvussu hetta fer at ávirka kyndilsliðið. Tað er fyrr hent, at tá eitt lið reisur seg, tá tað sær svartast út, og hóast tær skuldu tapt, so er hetta eingin katastofa fyri liðið, tí talan er hóast alt um besta lið í landinum.

Kyndilskvinnurnar hava sostatt alt at vinna og einki at tapa, tá tær sunnudagin fara á vøllin, og kann hetta merkja, at spælið verður meira frígjørt.

**Botnuppgerð í Havn**

Hjá monnunum vórðu hálvfinalurnar avgreiddar í miðvikuni, og tískil verða ongar broytingar í kappingarskránni hjá teimum.

Leygardagin verður ein dystur uppi á Hálsi, tá botnuppgerð verður millum H71 og Tjaldur. Seinasta vikuskifti datt H71 niður á aftasta plássið, við tað at Tjaldur á heimavølli tapti móti kollfirðingum, og tískil er umráðandi hjá báðum pørtum at fáa sær tvey stig leygaragin.

Sunnudagin verða tveir dystir leiktir. Í Havn skal Kyndil royna seg móti føroyameistarunum av Strondum, og hóast høvuðsstaðarfelagið nú er um at verða siglt aftur úr í dystinum um FM-heitið, so vilja teir ivaleyst prógva, at teir eiga at verða taldir við, tá tosað verður um bestu hondbóltslið í landinum. Mikudagin vístu teir í øllum førum, at tað ber til at vinna móti vestmenningum, og halda teir á fram við sama spæli, kunnu teir eisini geva strandingum alstórar trupulleikar.

Sunnudagin verður somuleiðis grannauppgerð í Vestmanna, og hóast tað mangan verður tikið til, at í slíkum uppgerðum kann alt henda, so er lítið at ivast í, at vestmenningar fara avstað við stigunum í hesum dysti.



*Stóri spurningurin hjá monnunum er, um tað endiliga skal eydnast Kyndli at basa einum av oddaliðnum*

***Savnsmynd***

# Byrja nú upp á endaspælið

*Flogbóltur: Um vikuskiftið fara flogbóltsspælararnir undir endaspælið, men broytingarnar í oddinum vera neyvan tær stóru. Mjølnir hjá kvinnum og Fleyr hjá monnum verða uttan iva meistarar tá liðugt er*



*TB liggur í løtuni á øðrum plássi, men tað er lítið sannlíkt, at tær fáa gjørt nakað viðKlaksvíksgenturnar*

***Savnsmynd***

SVEINUR TRÓNDARSON

Nú jólini og nýggjárið eru farin væl og virðiliga afturum, byrjar flogbóltskappingin aftur. Endaumfarið stendur nú fyri durum og stigini, sum liðini høvdu undan jólasteðginum, eru býtt í helvt.

Hóast tað ber til at gita um hvør væntandi fer at gerast meistari, og her á blaðnum væntað vit, at støðan verður nett tann samma, tá árið endar, sum hon var undan jólum.

Hvussu er og ikki, so eru nógvir dystir, sum skulu avgreiðast áðrenn ta tíð, og hetta vikuskiftið vera fimm dystir, tveir í kvinnudeildini og tríggir í mansdeildini.

**Mjølnir vælkoyrandi**

Seinasta vikuskiftið skipaði Mjølnir fyri steypakapping fyri tey vaksnu, og sum so ofta áður vunnu tær sjálvar meistaradeildina hjá kvinnum. Finaludysturin var móti Drátti, og dysturin leygardagin verður ein endurtøka av tí.

Havandi dystin seinasta sunnudag í hugað, so er illa hugsandi, at Dráttur fær gjørt stórvegis við meistararnar í fjør, tí tær hava verið væl koyrandi higartil í ár.

Rutinan á liðnum hevur borið tær fram, tá á hevur staðið, og tað er lítið sannlíkt, at nakað av hinum liðunum kann gera stórvegis við Mjølnir.

Hjá Drátti hevur verið meira so sum so í ár. Liðið er gott, men til tíðir sær út til at trúgvin á egin evnir manglar, og tað er synd. Úrslitini higartil í ár vísa eisini gongdina, tí tær munnu hava vunnið og tapt líka nógv.

Hin dysturin stendur millum TB og Fleyr og hann sær spennandi út. Um Fleyr skal gera sær vónir um at skal Mjølnir í ár, so skal alt vinnast hiðani til liðugt er at spæla í ár, men tað er ein spurningur, um liðið er búgvið til tað.

Til Mjølnir-kappingina snávaðu tær, og komu tí ikki í finaluna, og tí vilja tær uttan iva vísa, at tað var eitt mistak.

TB er harafturímóti torførari at meta um. Tær liggja á øðrum plássi í løtuni, men av tí at tær m. a. ikki vóru við í Klaksvík seinasta vikuskiftið, ber illa til at meta um leikligu støðuna í løtuni. Vit kunnu tó staðfesta, at TB á heimavølli altíð eru sterkar.

**Stórdystur í fyrsta umfari**

Tann mest spennandi dysturin hetta vikuskiftið í mansdeildini er uttan iva tann millum Fram og Mjølnir, sum verður á Eysturskúlanum sunnudagin. Hesi bæði liðini eru á øðrum plássi í deildini og skulu tey gera sær nakra hóming um at skala Fleyr, sum í løtuni tykist kunnu ganga á vatninum, so skal alt vinnast frameftir.

Fram hevur havt gott tak á Mjølnir á heimavølli, men tað er spurningurin um Borko Ilic kann gera munin. Hann er sera góður spælari, men tað er Rúni Weihe hjá Fram eisini, og hann tykist vera komin fyri seg aftur, eftir skaðan hann hevur drigist við.

Í Gundadalshøllini spæla Fleyr a og SÍ. Um Fleyr a er ikki so nógv at siga, tí teir hava vunnið tað sum er at vinna í kappingarárinum - við húð og hár. Tað er heldur eingin ivi um, at tað er uppiborið, tí higartil eru tað teir, sum hava víst so nógv tað besta spælið í deildini.

Sørvingar koma til Havnar við fleiri tapum í ryggsekkinum. Tað er synd, tí eina løtu í fjør, gekk sera væl í hond hjá teimum. Teir vunnu fleiri dystir og lógu einu tíðina nummar tvey. Men sum vera mann, leikararnir eru ungir, og teir hava tíðina fyri sær. At teir fáa vent keðiligu gongdini ímóti Fleyr er kortini ikki sannlíkt, tí til tað er munurin alt ov stórur.

Seinasti dysturin er millum ÍF og Fleyr b og skulu vit gita, so stendur ÍF, sum vinnari, tá dysturin er av. Illa ber kortini til at meta um styrkina á liðunum, tí hvørki teirra var við í steypakappingini seinasta vikuskiftið. Fleyr meldaði ongantíð til, tí fólkagrundarlagið er lítið og ikki nóg gott til meistaradeildina, meðan ÍF enn einaferð meldaði til, fyri síðani at lata vera við at møta.